

FØROYABANKI

Shipping Føroyar 2008

Saman leggja vit lunnar undir nýggja vinnu

Norðurlandahúsið 7. mars

Skrá:

09.00 Skráseting og morgunmatur

09.30 Vælkomin

09.35 Løgmaður setir ráðstevnuna

09.45 Shipping: Ein global vinna
Jan Frits Hansen, varastjóri, Danmarks Rederiforening

10.15 Samstarv er neyðugt
Klaus Kjærulff, CEO, Torm A/S

10.45 Stuttur steðgur

11.15 Uppkeyp og skráseting av einum reiðaríi
John Rajani, leiðari fyri Corporate Finance í Føroya Banka

11.45 Frálandavinna: Soleiðis gera vit
Anne Jorunn Møkster, CEO, Simon Møkster Shipping

12.15 Døgurðasteðgur

13.30 Frálandavinna: Vinnuøki fyri føroyingar?
Albertus Zwiers, tekniskur stjóri, Mærsk Supply Service

14.00 Innveiting av tænastum
Lassi Borðoy, stjóri, Sjóvinnudepilin CMM

14.30 Kaffisteðgur

15.00 Framløga av vinnumøguleikum: FAS
Ólavur Gregersen, stjóri, Bitland

15.30 Er FAS-skipanin ein veruligur møguleiki?
Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri, Skipaeftirlitið

16.00 Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum
endar ráðstevnuna

Tekning á www.industry.fo

Stuðlar: Føroya Banki, Reiðarafelagið fyri farmaskip, Sjóvinnudepilin, Supply Service, Thor, Statoil, BP, Team beredskab.

SENDISTOVAN

# Bretar bjóða nýggj øki út til oljuleiting



## 3. útbjóðing í Føroyum bíðar eftir endaligari viðgerð í tinginum

ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um somu tíð sum 3. útbjóðing á føroyska landgrunninum liggur og bíðar eftir endaligu viðgerðini í løgtinginum leggja bretskir vinnumyndugleikar nú út við tí 25. útbjóðingini á bretska landgrunninum. Eitt øgiligt tal av teigum, 2.297 verður boðið út og verður hetta tikið sum tekin um, at bretar helst síggja, at oljufeløg raðfesta bretska landgrunnin hægri og gera sítt til at gera fund, sum aftur kunnu gera stóra bretska eftirspurningin eftir olju og gassi minni heftan av útlandinum í framtíðini. Útbjóðingin fevnir eisini um fleiri teigar, sum vórðu latnir í 2007 men sum oljufeløg ikki hava gjørt nakað við og tí eru endaðir aftur hjá myndugleikunum. Bretar hava sett feløgunum strangari krøv um tíðina tey hava til at búna loyvi til boring men hava samtíðis eisini givið feløgum, sum veruliga vilja nakað fyrimunir skilst. Bretski orkumálaráðharrin, John Hutton sigur, at nýggja útbjóðingin fevnir eisini um øki, har oljuleiting ikki hevur verið áður, eitt nú vestan fyri Hebridurnar. – Hetta skal skiljast sum at vit veruliga hava eitt ynski um, at allur landgrunnurin verður kannaður fyri at økja um kolvetnisgoymslurnar sigur Hutton við North Sea Lettter. Freistin at lata inn umsóknir er 21. mai.

### 3. útbjóðing í Føroyum

Í Føroyum verður í løtuni bíðað eftir, at uppskotið til 3. útbjóðing kann vera endaliga avgreitt. Tað var til 1. viðgerð í tingimum, áðrenn løgmaður gjørdi av at skriva út val. Nú liggur tað so í nevnd og bíðar eftir at verða endaliga samtykt. Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi sigur seg vóna, at uppskotið skjótt kemur aftur á tingborð, soleiðis at teir kunnu lata loyvisumfarið upp fyri oljufeløgunum. Valið hevur so seinkað hesum nakað men stjórin í Jarðfeingi heldur ikki, at hetta fer at skaða útbjóðingina. Bara hon kann fáast av bakkastokki í næstum, so skuldi boriðtilatalmannakunngjørt útbjóðingina skjótast, soleiðis at feløgini kunnu fáa endaliga fráboðan í summar ella í heyst.